Árni Olafson leiðari fyri samráðingunum um markið:

– Ein avklåring má koma í hesum ári

Tað sær framvegis torført út at fáa eina samráðingarloysn um markið. Árni Olafson, sum stendur á odda fyri samráðingunum, heldur fyri, at ein avklåring má koma í 96, har tað antin klárnar fyri eini samráðingarloysn ella einum sakarmáli.

Jan Muller

Umframt at vera leiðari fyri arbeiðinum í Oljuráðleggingarnevndini í sambandi við komandi tilrættalegging av oljupolitikkinum, so stendur Árni Olafson eisini á odda fyri hinum týðandi spurninginum í olju/undirgrundarmálinum, nevniliga nevndini, sum samráðst við bretar um markið.

Vit spurdu Árna Olafson, hvussu hann metir møguleikarnar at fáa eina semju har, sum kann gagna gongdini á oljuøkinum her hjá okkum?

-Fundur var herfyri í London. Hann gekk sum vit høvdu roknað við og eg haldi vit komu nakað longur ávegis. Men spurningurin er tá bert ávegis móti hvørjum? Tað vita vit ikki.

Uppá fyrispurning um føroyingar hesaferð komu við nøkrum nýggjum, og um vit við hesum seinastu samráðingarumførunum hava lagt eina nýggja linju sigur Árni Olafson, at tað eru ymsir mátar at pre-sentera sína støðu uppá, og í hesum umfarinum gjørdu teir tað so uppá ein nýggjan máta.

-At tað hevur verið ein seinking uppá umleið eitt hálvt ár, er tað nakað, sum hevur gagnað okkara støðu ella hevur hetta bert verið ein óheppin seinking?

Tað vil eg helst ikki úttala meg um.

Men tit hava avtalað at samráðast aftur í summar?

-Ja, men vit vilja ikki ásetа nakran ávísan dato. Tað skal avtalast seinni, tá bretar eru klárir til ein fund.

Er tað teirra útspæl?

Í hvussu er vendi tað tann vegin hesuferð, at tað vóru vit, sum komu við einum útspæli. Nú skal ein ongantíð verða alt ov fýrakantaður á hesum økinum, men eg haldi í hvussu er, at ein fundur gevur hesta meining, um teir koma við onkrum.

Fundurin verður í Keypmannahavn.

Tað sær torført út

-Nú segði Anthony Layden, sum fyrr hevur verið við í bretsku nevndini, við Sosialin herfyri, at kom glið á málið á fundinum í London, so var kanska ein loysn í eygsjón í hesum árinum. Kann tú taka undir við tí?

-Tað vil eg ikki vísa aftur.

Men sær tað framvegis líka svart út at finna eina samráðingarloysn?

-Tað sær torført út.

-Nær koma vit hartil at skulu siga, antin vit fara til Haag ella ikki?

Báðir partar hava verið sera varnir við ikki at framprovokera eina slíka støðu. Men tað má vera eitt mark fyri, hvussu leingi ein kann blíva við at tøva í sama stað.

-Heldur tú vit fara inn í 97 uttan at hava fingið loyst upp fyri nøkrum?

-Eg haldi, at ein avklåring má koma í 96. Og hon kann antin vera, at nú klárnar fyri eini loysn ella fyri einum sakarmáli.

-Nú tá tú arbeiðir bæði við at fáa loysnt marknatrætuna og at fáa lagt støði undir eini lisensrundu, sær tú tá ta óloystu marknatrætuna at vera eina forðan fyri einum oljuútviklingi á føroyskum øki?

-Tað er greitt, at tá tú tosar við oljufeløgini, so spyrja tey dúgliga eftir hesum, og tað merkir, at tað ávirkar teirra áhuga og ætlanir, um tað nú verður ein greið marknastøða ella ikki. Tað er eisini greitt, at okkara útboðspolitikkur má so taka hædd fyri marknaðstøðuni og tað er eisini so, at tað hevði verið so nógv einfaldari, um markið varð komið uppá pláss.

-Heldur tú, at tað fer at seinka útviklinginum og at minka um áhugan hjá oljufeløgunum, um markið ikki er komið uppá pláss til ta tíð, tá lisensir skulu bjóðast út?

-Tað tori eg ikki at siga nakað um enn. Koma vit hartil, at tíðin til eina útbjóðing er vorðin búgvin, og at markið ikki er komið uppá pláss, so mugu vit leggja tað upp til tað politiska valdið at taka nakrar møguligar leiðir burtur úr tí trupulleikanum. Men tað er ov tíðliga enn at leggja seg fast uppá tað nú.

-Men er ikki eisini møguleiki fyri, at Føroyar og Bretland gera eina fyribils avtalu um, at í einum ávísum umstriddum økí, sum er sera áhugavert fyri oljufeløgini, ber til at gera kanningar uppá tær og tær treytir?

-Tað tori eg heldur ikki at siga nakað um enn. Tað krevur sjálvandi, at báðir partar eru áhugaðir fyri tí.

Neyvan broyting í støðu okkara

Vit spurdu Árna Olafson um hann heldur, at ein nýggj stjórn í Føroyum fer at leggja nakra nýggja kós í marknasamráðingunum?

Tað heldur hann ikki, tí tað verður jú roynt at samráðast baserað uppá ein konsensus í tí føroysku skipanini tvs. út frá eini so breiðari semju sum møguligt.

-Nú verður oftani sagt, at oljufeløgini dáma best at arbeiða í politiskt tryggum økjum. Kann ein siga, at Føroyar eru eitt ótrygt øki, nú vit skifta landsstýri í úrtíð ella sær tú nakran trupulleika í hesum?

-Nei. Í einum parlamentariskum systemi er tað nú heilt vanligt, at val verður skrivað út í úrtíð, at stjórnir skifta og hvørt av sínum. Tað, sum ræður um, er at hava ein oljupolitikk, sum hevur so breiða undirtøku, at hann ikki víkast, sjálvt um "kaleidoskopið verður rist av og til" sum hann málber seg.

Rock All økið

Árni Olafson dylur ikki fyri, at talan er ikki bert um hesa eina marknatrætuna, sum Føroyar hava at dragast við. Tað snýr seg eisini um alt tað stóra økið sunnan fyri Føroyar tvs. Rock All og Hatton-háslættan, sum fleiri lond gera krav uppá harímillum Føroyar/Danmark.

-Tað økið er umstrítt so tað stendur eftir. Men vit halda tað er meira umráðandi at fáa avgreitt ósemjuna um tað økið, sum liggur innan fyri 200 fjórðingar fyrst. Hitt liggur eitt sindur longur frammi í tíðini.

Teir ymsu partarnir, sum gera krav uppá hetta økið royna hvør í sær at savna inn vísundalig prógv fyri, at økið er teirra. Føroyingar halda m.a. at landgrunnurin heldur náttúrliga fram suðureftir, meðan t.d. bretar halda, at hetta økið er partur av teirra landgrunni.

Tað eru nú trý ár síðani, at Árni Olafson fekk farloyvi frá sínum arbeiði í danska uttanríkisráðnum og tók við leiðsluni av samráðingunum við bretar.

-Eg hevði ikki roknað við at tað fór at taka so drúgva tíð, men neyvan heldur verður tað nakað lívsstarv, tó at eg havi tað gott í hesum arbeiðinum, sum er sera áhugavert.

-Men tú heldur fram til "the bitter end"?

-Tað rokni eg við.

Árni Olafson og David Anderson, leiðarnir í teimum báðum samráðingarnevndunum her á veg á fund í Tinganesi. Mynd Jan

Strikan næst Føroyum hava vit sjálvi sett eftir upplýsingum vit hava fingið um upprunaliga krav breta til undirgrundarmark. Millum "trappuna" tvs. Hvíta økið og upprunakrav breta liggur tað økið sum útlendsku oljufeløgini halda vera mest áhugavert, og tað er eisini her, at seismiskar kanningar verða gjørdar í løtuni. Eystan fyri Hvíta økið síggjast leiðirnar, har olja er funnin.